# GERÐABÓK

**Dato:** **2. september 2004**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:** **104/04-117/04**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Jan Christiansen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Jákup Suni Joensen
Høgni Mikkelsen
Schumann Hjaltalin
Sjúrður Olsen
Beate L. Samuelsen
Elin Lindenskov
Hildur Eyðunsdóttir
Leivur Hansen
Jan Christiansen
Annfinn Brekkstein fyri Kirkjubøar kommunu

**LUTTÓK IKKI:**
Tórfinn Smith
Jógvan Arge
Bjarti Mohr
sum eru burturstaddir

**LUTTÓK EISINI:**

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Heri Olsen

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, kl. 18.00:**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**106/04** **200400038**

**Mál beind í nevndir.**

**Býráðið 2. september 2004:** Tikið til eftirtektar við viðmerkingum.

**107/04** **200202772**

**Politiskar/fyrisitingarligar mannagongdir í sambandi við verkætlarnir ið skulu fíggjast av konto fyri íløgur hjá sosialu-, mentamála-, teknisku-, byggi- og býarskipanar-, heilsu- & umhvørvis-, havna- og fíggjarnevndunum við støði í stýris- og fundarskipanini.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tá ið kommunan fer undir at fyrireika bygging, umbygging ella keyp av ogn, er umráðandi, at fyrireikingararbeiðið verður væl fyriskipað, soleiðis at kommunan fær eitt gott úrslit, ið tekur seg væl út, hevur góðan kvalitet og er brúkaravinarlig. Eisini er umráðandi, at allir partar, sum náttúrliga eiga at verða við í projektinum, luttaka, soleiðis at eingir trupulleikar stinga seg upp seinni.

Fyri at náa hesum hevur serstaki ráðgevandi bólkurin endurskoðað gjørdu politisku/fyrisitingarligu mannagongdirnar fyri sosialu- og mentamálanevndirnar, og gjørt uppskot til politiskar/fyrisitingarligar mannagongdir fyri teknisku-, byggi- & býarskipanar-, heilsu- & umhvørvis-, havna og fíggjarnevndirnar við í støði í stýris- og fundarskipaninunum.

Uppskotini eru gjørd saman við kommunu- og tekniska stjóranum. Havnameistarin hevur verið við til at gera uppskotið viðvíkjandi havnanevndini, trivnaðarstjórin fekk ikki komið á fund vegna fund í mentamálanevndini, har deildarleiðarin hevði forfall. Trivnaðarstjórin hevur, eins og tekniski stjórin og

bólkalimirnir, fingið uppskotini til mannagongdir fyri sosialu- og mentamálanevndirnar til ummælis.

Trivnaðarstjórin hevur á seinni fundi verið við til at gera mannagongdirnar.

Serstaki ráðgevandi bólkurin heldur, at fíggjarnevndin eigur at samtykkja uppskotini, sum liggja í málinum.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2004:** Útsett til næsta fíggjarnevndarfund.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2004:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 19. august 2004:** Samtykt við broytingum at leggja mannagongdirnar fyri býráðið.

**Býráðið 2. september 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**108/04** **200401161**

**Álegging av graslíki á verandi spælipláss við býlingshúsið á Norðasta Horni.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Samlaði kostnaðurin at leggja graslíki, dren og asfaltering, girðing og annað kostar kr. 810.000,00.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin mæla til at játta peningin av íløgum fyri 2004, sum mentamálanevndin hevur samtykt at brúka til smærri graslíkisvøllir.

**Mentamálanevndin 30. juni 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og leggja málið fyri býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. august 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 2. september 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**109/04** **200400214**

**Nýggjur fólkaskúli í Hoyvíkshaganum.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tórshavnar kommuna hevur avgjørt at byggja nýggjan 2-sporaðan fólkaskúla við frítíðarskúla til 1.-9. flokk í Hoyvíkshaganum. Frítíðarskúlin skal hýsa 1. og 2. flokki.

Í heildarætlanini skal pláss leggjast av til svimjihyl, sum møguliga kemur seinni.

Eftir starvsskipanini hjá kommununi í byggimálum fær mentamáladeildin eina byggiskrá til vega. Henda byggiskrá verður síðani grundarlag undir útinning av verkætlanini, sum byggideildin hevur ábyrgdina av.

Endamálið við byggiskránni er:

at orða og samskipa tørv, ynski og krøv arbeiðsánarans
at útgreina, í hvønn mun tað ber til at ganga hesum tørvi, ynskjum og krøvum á møti
at vísa á prinsipploysnir á hesum grundarlagi

Við tí í huga at støðug menning og broyting er innan skúlaøkið, og at roknast kann við umskipaðum virksemi, tá nýggir karmar loyva hesum, er lítið sannlíkt, at tað ber til at gera eina neyva meting nú av, hvussu virksemið verður, tá ætlaða bygg-ingin verður tikin í nýtslu. Tí er dentur lagdur á at skapa so víðar og broytiligar umstøður sum gjørligt til skúlan.

Arbeiðsbólkurin, ið hevur staðið fyri byggiskránni, hevur viðgjørt stakspurningar saman við fólki við serligum innliti, tá tað hevur verið mett neyðugt.

Byggiskráin er býtt upp í 4 partar:

1. Almennur partur
2. Námsfrøðiligur partur
3. Hølisskrá
4. Byggitøkni

**Grundøki**
Kommunan hevur lagt av eitt øki við Løgmannabreyt til skúlan. Víddin er sam-bært korti 17.600 m². Økið er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Støddin tykist hóskandi, tá hugsað verður um tørvin á byggilendi (nakað minni enn 5.000 m², tí bygt verður væntandi í meira enn einari hædd), fríøki (minst eini 10 m² fyri hvønn næming) og ferðslu (vegir, gøtur, bilpláss). Tá farið verður undir at gera byggiuppskot, má kortini metast um støddina við atliti til byggihátt, landslag og ferðslu.

**Kostnaður**
Bygningsstøddin er ásett av Tórshavnar kommunu. Støddin er grundað á eina bruttogólvvídd uppá 11 m² fyri hvønn næmingin. Afturat hesum kemur pláss til frítíðarskúla í 1. og 2. flokki, og pláss til skúlabarnatannlækna.

Samlaða næmingatalið, tá skúlin er fult útbygdur, kann setast til eini 450. Tá er roknað við 18 flokkum við 25 næmingum.

Út frá hesum kann væntast, at samlaða gólvvíddin verður umleið 5.400 m².

**Kostnaðarkarmur**
Sum grundarlag undir framhaldandi ráðleggingini ber helst til at siga, at samlaða íløgan uttan meirvirðisgjald verður:

5.400 m² av gólvvídd fyri 5.400 m² x kr. 18.000 = 97,2 mill. kr.

Hetta má kortini metast sum ein vegleiðandi karmur, til støða er tikin til, hvussu byggiætlanin skal fremjast.

**Tíðarætlan**
Skotið verður upp, at skúlin skal byggjast í einum, men byggingin skal leggjast soleiðis til rættis, at yngstu flokkarnir sleppa í skúla skjótast gjørligt, og hinir so hvørt byggingin verður liðug.

Eftir tíðarætlanini verður allur skúlin liðugur á sumri 2006.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamáladeildarleiðarin mæla til at góðkenna fyriliggjandi byggiprogramm, at projektering verður sett í verk beinanvegin, og at peningur verður játtaður til hetta av íløguætlanini 2003 og 2004.

**Mentamálanevndin 16. september 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamáladeildarleiðaranum og leggja málið fyri býráðið.

Eisini samtykt at heita á plandeildina um at skipa soleiðis fyri, at yngstu flokkarnir sleppa í skúla í august 2005, og hinir flokkarnir so hvørt byggingin verður liðug.

**Býráðið 25. september 2003:** Einmælt samtykt at taka undir við mentamálanevndini við tí ískoyti, at málið verður lagt aftur fyri býráðið, tá disposition og projektuppskot eru liðug.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyri nevnda mæla tekniski stjórin og býararkitekturin til:

01) at verkætlanin verður gjørd í "partnering".

02) at projektuppskot verður gjørt at leggja fyri nevndina aftur til góðkenningar saman við kostnaðarmeting og cachflow.

03) at arbeiðið verður boðið út, tá projektuppskotið er gjørt, og at teir bjóðandi verða 3 entreprenørar, sum hava royndir innan partnering.

04) at ein treyt í útbjóðingartilfarinum verður, at teir bjóðandi í størsta mun skulu nýta føroyskar undirarbeiðstakarar.

05) at tilboðini, sum koma inn, verða løgd fyri nevndina aftur til støðutakan við tilmæli frá stýrisbólkinum.

06) at stýrisbólkurin verður mannaður soleiðis:
Eitt umboð fyri arbeiðsánaran,
Eitt umboð fyri arkitektin,
Eitt umboð fyri verkfr. (møguligt)
Eitt umboð fyri entreprenørin

07) at arkitektaráðgevi verður settur beinanvegin, og verkfrøðingaráðgevar tá tørvur er á tí.

08) at kommunan setur ein samskipara/skrivara í starv á planleggingardeildini í fulla tíð til burturav at taka sær av verkætlanini, og at hetta starv verður lýst leyst. Starvið skal verða tíðaravmarkað frá febr./mars 2004, til byggingin er liðug og avhendað.

09) at projektleiðari verður valdur av stýrisbólkinum, tá hesin, eftir útbjóðing hevur sett organisatiónina saman.

Umframt omanfyri nevnda mæla tekniski stjórin og býararkitekturin til, at mentamálanevndin tekur støðu til:

10) um ítróttarhøll ella fimleikahallirnar skulu gerast.

11) um graslíkisvøllur við rennibreyt, gummivøllur til rennufjalir og umstøður til nakað av frælsum ítrótti skal verða við í verkætlanini.

**Mentamálanevndin 19. november 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum, men at spurningurin um útbjóðingarhátt verður viðgjørt á einum seinni fundi.

Eisini samtykt at taka undir við, at ein dupult fimleikahøll verður gjørd og at taka undir við at graslíkisvøllur við rennibreyt, gummivøllur til rennifjalir og umstøður til nakað av frælsum ítrótti skal verða við í verkætlanini.

**Mentamálanevndin 3. desember 2003:** Samtykt at fara undir projekterings-arbeiðið beinanvegin og gera uppskot til arbeiðs- og tíðarætlan at leggja fyri nevndina á fyrsta fundi 2004.

Málið verður sent til byggideildina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til hvønn av omanfyri nevndu møguleikum skal arbeiðast eftir.

**Mentamálanevndin 10. februar 2004:** Samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við uppskoti 2 at leggja fyri nevndina skjótast gjørligt og beina málið í byggideildina.

**Mentamálanevndin 3. mars 2004:** Samtykt at byggja ein skúlabygning við verandi Hoyvíkar skúla, sambr. støðumynd, dagfest 3. mars 2004, sum skal kunna hýsa yngstu flokkunum og frítíðarskúla.

Eisini samtykt at játta kr. 100.000,00 av íløgujáttanini 2004 til ger av dispositiónsuppskoti at leggja aftur fyri nevndina skjótast gjørligt, og beina málið til byggideildina.

**Ískoyti:**
Árni Winther, ark., hevur gjørt dispositiónsuppskot.

## 1. Inngangur

Tórshavnar kommuna hevur latið gera eina byggiskrá, sum lýsir ætlanina at byggja ein nýggjan skúla í Hoyvíkshaganum. Byggiskráin er í fýra pørtum og dagfest juni 2003. Byggiætlanin er síðani viðgjørd politiskt og námsfrøðiliga. Eftir ársskiftið varð arbeiðið at fáa til vega eitt skipanaruppskot sett í verk.

Stórur tørvur er á nýggjum skúla í økinum. Kortini hevur kommunan mett, at ein so stór verkætlan skal umhugsast gjølla, áðrenn farið verður undir byggingina. Tí verður arbeitt við at fáa skúlastovur tøkar við verandi Hoyvíkar skúla frá skúlaárinum 2005/2006 til yngstu flokkarnar. Hesir flyta so í nýggja skúla, tá hann er klárur at taka í nýtslu.

Ætlanin er at byggja nýggja skúlan so skjótt, hetta verkliga letur seg gera, og fíggjarorkan hjá Tórshavnar kommunu loyvir.

## 2. Grundøkið

Í heildarætlanini fyri Hoyvíkshagan hevur Tórshavnar kommuna lagt eitt økið av til nýggjan fólkaskúla. Økið er eystan fyri Løgmannabreyt, niðan fyri innkoyringina til útstykkingina, ið nú er í gerð. Eystast er hagalendi við jøvnum halli suðureftir, í miðjuni eitt gil við einum hamarskapilsi upp frá eystureftir, og eystasti parturin er ein slætti við jøvnum halli suðureftir. Ein lítil graslíkisvøllur er inn frá Løgmannabreyt.

Á grannaøkinum eystanfyri er partur av ætlaðu miðstaðarbyggingini, sum gongur oman og niðan frá Vegnum Langa.

Samlaða støddin á økinum, sum er sett av til skúlan, er umleið 17.600 m².

**3. Innrættingin námsfrøðiliga**
Hølisskipanin byggir á tann partin av byggiskránni, ið lýsir námsfrøðiligu hugtøkini, sum skúlin skal virka eftir. Arbeiðsbólkurin, ið tilevnaði byggiskránna, hevur havt høvi at gera viðmerkingar, meðan arbeitt hevur verið við skipanaruppskotinum.

Grundhugsjónin er: "at byggiháttur og innrætting skúlans er fyriskipað soleiðis, at tað ber til at hava eina fjølbroytta undirvísing, ið verður lagað eftir tørvi og fortreytum næminganna."

Hølini eru av hesi orsøk ymisk í skapi, stødd, hædd, tilfari, litum og ljósi.

Flokkarnir hoyra til "heimsrustir", sum umfata:

- 1.-3. flokk við frítíðarskúla
- 4.-5. flokk
- 6.-7. flokk
- 8.-9. flokk

Serhøli er í fakdeplum, sum hava hvør sínar bygningskarmar, svarandi til ymiska tørvin.

**4. Lendisskipan**
Tilkoyring er skipað í samstarvi við vegaumsitingina soleiðis, at børn trygt kunnu verða sett av í lumma framvið Løgmannabreyt, og bilarnir fáa vent í komandi rundkoyring beint omanfyri.

Bilar, ið skulu steðga, koyra eysturum við tilkoyring frá nýggja miðstaðarøkinum har. Pláss er fyri umleið 60 parkeringsplássum. Økið eystanfyri er harumframt lagt av til ítróttarendamál.

Vestanfyri er góður sólargangur og møguleiki at skapa lívd, so her eru spælipláss og fríøki til næmingarnar. Sunnanfyri er útiøki uppat matarhøll, og skermað útiøki til yngstu næmingarnar í skúla og frítíðarskúla.

Í byggiskránni var kravt, at øki skal ávísast til eina nýggja svimjihøll. Mælt verður til, at henda verður partur av miðstaðarøkinum, sum liggur høgliga fyri hjá skúlanum og almenninginum, og kann brúka somu parkeringspláss, tá skúlin ikki er í nýtslu

**4. Umfatan**
Í byggiskránni grein 5.1 vóru nakrar metingar gjørdar um samlaðu gólvvíddina, grundaðar á ein karm uppá 11 m² fyri hvønn næming, ið Tórshavnar kommuna

hevur víst á. Samlaða støddin var út frá hesum sett til 5.400 m², har umleið 450 m² vóru til heilsurøkt og frítíðarskúla.

Eisini var í hesi grein í byggiskránni sagt: "*So hvørt byggiætlanin gerst meira ítøkilig, verður mett um, hvussu støddarkarmurin hóskar.*"

Í skipanaruppskotinum eru ynski og krøv til innrætting samanfatað í eini ítøkiligari byggiætlan, har hvør einstøk funktión er vigað eftir námsfrøði, bygging og stødd/kostnaði.

Fyri at halda støddarkarmin, eru nakrar raðfestingar gjørdar í byggiskránni.

Mett verður, at heimaøkini ikki kunnu gerast munandi minni um námsfrøðiliga grundhugsanin ikki skal fara fyri skeyti. Somuleiðis er støddin á flestu fakhølum á markinum til tað sum krevst.

Hinvegin er økið til ítrótt minkað samanborið við ásetingarnar í byggiskránni, har ynski varð tvær hallir nakað størri enn vanligar himleikahallir, umframt pláss til amboð, neyðug skiftirúm o.a.

Orsøkin til hesa minking er partvís, at ítróttarøki er sera plásskrevjandi fyri hvønn næming, og partvís tí, at á donsku skúlunum, ið bygdir eru sambært somu fortreytunum, er eitt ikki so stórt multirúm til ítrótt, ístaðin fyri eina ella fleiri fimleikahallir/ítróttarhallir.

Hølisyvirlit:

| | |
| --- | --- |
| Heimrustir | 2.141 m² |
| av hesum frítíðarskúli | 237 m² |
| Felagsøkir og fyrisiting | 1.608 m² |
| Ítróttur | 685 m² |
| Fakdeplar | 890 m² |
| Heilsurøkt | 126 m² |
| Bruttostødd tilsamans | 5.450 m² |

**4. Byggitøkni**

Sum grundarlag undir byggiháttinum eru hesar fortreytir valdar:

- Tað er av stórum týdningi, at tilfar og konstruktiónir tola ætlaðu nýtsluna. Hetta hevur týdning bæði fyri at skúlin ikki alt fyri eitt sær slitin út, so næmingarnir ikki virða bygningskarmarnar, og fyri at viðlíkahaldið ikki skal gerast ov stórt.
- Fyri at avmarkað íløguna mest møguligt, verða einfaldar loysnir valdar, allastaðni har tað ber til.

Vit ímynda okkum lættar konstruktiónir, helst úr stáli og timbri, við neyðugum stoyptum konstruktiónum. Bygningsskapið ger, at tryggar loysnir kunnu veljast til at fáa tett móti avfalli og vindi.

Støða er ikki tikin til uttandura klæðing av veggjum og tekju. Tilfarið skal tola veðurlag og slit av nýtsluni, og avmarka viðlíkahaldið. Skilaveggir úr plátum við neyðugari styrki og ljóðdoyving. Loftini eru klødd við ljóðdoyvandi gipsplátum. Gólv løgd við t.d. linoleum, í duri flísar. Innhurðar við massivum hurðabløðum.

Roknað er við, at heimrustir, heilsurøkt og verkstaðsbygningur verða sjálvstøðugar brunaeindir í eini hædd við rýmingarleiðum beinleiðis út í lendið. Hetta er mest einfalda loysnin. Brunatrygd í felagsøkjum skal tryggjast eftir samráðing við myndugleikarnar við atliti til nýtslumøguleikar og kostnað.

Hóast ongi lógarfest krøv eru, verður mælt til, at rørslutarnað fáa brúkt skúlan. Hetta er gjørligt við vístu skráunum og lyftu.

Krøvini til inniklima eru lógarfest. Sambært reglunum skal mekaniskt luftskifti verða í nýggjum skúlum. Tó ber til at víkja frá hesum, um tað er sannlíkt, at inniluftin verður nóg góð við øðrum tiltøkum. Við okkara royndum á økinum mæla vit til, at loftshæddin verður stór og teldustýrt natúrligt luftskifti tryggjað. Fortreytin fyri, at hetta riggar er, at sólskermingin er munagóð.

Roknað er við fjarhita. Mælt verður til at kanna, um tað loysir seg at brúka tekjuna til orkuískoyti við sólorku.

Bygningurin skal fyrireikast til tráðleysa samskiftisútgerð.

## 5. Tíðarætlan

Verkætlanin verður útint við støði í tíðarætlan, *Fylgiskjal 2*, til byggiskránna. Staðfestast kann, at fyrireikingararbeiðið viðvíkjandi uppskotsstiginum ikki varð klárt at byrja sum ætlað, og at tað hevur tikið drúgvari tíð enn mett. Kortini forðar hetta ikki fyri, at komandi arbeiði verður gjørt innanfyri tey ætlaðu tíðarskeiðini frá nú at rokna.

Tá støða er tikin til, hvussu skúlin verður tikin í nýtslu, og tá greitt er, hvussu íløgukarmurin fyri hesa bygging sær út í mun til heildarkarmin hjá kommununi, verður tíðarætlanin endurskoðað.

## 6. Kostnaður

Verður metingin í byggiskránni (grein 5.2.) endurskoðað við somu fortreytum (m.a. príslegu várið 2003), við støði í støddini sambært *4. Umfatan* verður úrslitið:

**5.450 $m^2$ av gólvvídd fyri kr. 18.000 = 98,1 mill kr.**

Ein meira nágreinilig meting, sum byggir á veruligar nøgdir sambært hesi verkætlan, skal gerast í næsta arbeiðsstiginum, tá yvirskipað støða er tikin til bygningskonstruktiónir og –innleggingar.

**Víddin økjast**
Skal samtyktin í mentamálanevndini uppfyllast um, at skúlin skal innihalda eina dupulta fimleikahøll, má víddin økjast við 175 fermetrum.

Meirkostnaðurin fyri hesar fermetrarnar er 3,2 milliónir krónur, roknað út frá somu fortreytum sum samlaða kostnaðarmetingin.

Heildarætlanin verður ikki ávirka annars av hesi øking.

- Árni Winther, arkitektur, kemur at greiða frá uppskotinum.

**Mentamálanevndin 30. juni 2004:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at góðkenna skipanaruppskotið frá mai 2004, tó við tí broyting at ein dupult fimleikahøll verður gjørd, sum krevur umleið 175 m² afturat, og at høli til tannlækna og heilsukanningar verður víðkað við umleið 50 m².

**Fíggjarnevndin 19. august 2004:** Samtykt mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 2. september 2004:** Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, mælir til at taka undir við tilmælinum um at byggja nýggjan fólkaskúla í Hoyvíkshaganum tó við teirri broyting, at ásetingin, um at skúlin bert skal fevna um 1. til 9. flokk, verður tikin burtur. Í staðin fyri verður mælt til at beina málið aftur í mentamálanevndina til nýggja viðgerð og støðutakan til, um ikki skúli eigur at vera fyri næmingum í 1. til 10. flokki í Hoyvíkshaganum.

Atkvøtt var um kravið frá Heðini Mortensen um at beina málið aftur í mentamálanevndina, sum var samtykt við 6-2 atkvøðum.

Fyri atkvøddu Jan Christiansen, Heðin Mortensen, Schumann Hjaltalin, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen og Jákup S. Joensen. Ìmóti atkvøddu Leivur Hansen og Elin Lindenskov.

**110/04** 200202634

## Yvirtøka av Heygsgerði

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í umsóknarskrivi, dagfest 20. november 2002, verður heitt á kommununa um at yvirtaka Heygsgerði, matr. nr. 1045ak, Tórshavn.

**Tilmæli:**
Sambært galdandi mannagongd um yvirtøku av privatum vegum (j. nr 200202712/7), er vegurin í bólki 2-8. Tað vil siga, at vegurin var asfalteraður, tá ið vegarbeiðið var liðugt.

Vegurin hevur verið nýttur av almennari ferðslu, og í sambandi við byggingina av randarhúsum hjá sp/f Høgna Mikkelsen eru ymisk grevstrararbeiði gjørd á vegnum. Í sambandi við kantsteinsarbeiði fram við vegnum á báðum síðum er eisini her talan um grevstur í asfalteraðu koyribreytini.

Vegurin eigur at verða asfalteraður við nýggjum slitlagi, og kostnaðurin fyri hetta er mettur til umleið 100.000 kr.

Grundað á omanfyri nevnda mæla býarverkfrøðingurin og tekniski stjórin til, at umsøkjarin ger vegin lidnan, áðrenn kommunan gongur umsóknini á møti.

**Tekniska nevnd 3. desember 2002:** Meðan málið var til viðgerðar, luttók Høgni Mikkelsen ikki á fundi.

Nevndin samtykti, at umsitingin ger semju við umsøkjaran um yvirtøku av øllum vegnum.

**Fíggjarnevndin 19. august 2004:** Nú semja er gjørd við sp/f Høgna Mikkelsen, og kostnaðurin er goldin, mælir fíggjarnevndin býráðnum til at yvirtaka Heygs-gerði.

**Býráðið 2. september 2004:** Meðan hetta mál var viðgjørt, fór Høgni Mikkelsen av fundi.

Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**111/04** **200300719**

**Uppskot til mannagongd til váttan fyri vantandi barnaansing.**

Nú álagt er, at kommunurnar afturrinda Almannastovuni fyri útlagda forsorgarhjálp, vegna vantandi barnaansing, hevur Kommunusamskipan Føroya gjørt uppskot til mannagong fyri limakommunurnar ið skal tryggja, at kommunurnar bert rinda fyri tað tíðarskeið, foreldur vanta ansing.

**Fíggjarnevndin 19. august 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðtaka uppskot til mannagongd.

**Býráðið 2. september 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**112/04** **200400754**

**Leigusáttmálin við p.f. Asfaltverkið.**

Advokatfelagið hevur í skrivi, dagfest 30. juni 2004, eftir áheitan frá Asfaltverkinum gjørt hesar viðmerkingar til leigusáttmálan:

**Viðv. grein 3:**
ynskir felagið m.a. orsakað av, at felagið ger stórar íløgur fyri at seta Asfaltverkið upp á økinum, at leigusáttmálin verður galdandi í minsta lagi 20 ár, og at ásetingin um 6 mánaða uppsagnartíð verður gjørd greiðari, soleiðis at eingin ivi er um, at 6 mánaða uppsangartíðin ikki kemur í gildi fyrr enn tað áramálið, sum økið í minsta lagi verður leigað, er útgingin, Tað skal viðmerkjast at 20 ára leigumál ikki er óvanligt tá talan er um virksemi á leigaðum øki.

**Viðv. grein 6, stk. 3:**
ynskir felagið, at hava rætt til at leingja leigumálið í 10 ár afturat eftir at ásetta áramálið er útgingið, um so er at kommunan ikki sjálv skal nýta økið til egið brúk.

**Viðv. grein 7:**
vil felagið hava, at leigarin eisini kann uppsiga legumálið, um avtalan verður brotin, at leigusáttmálin bert kann uppsigast um talan er um munandi brot, og at tað verður innførd ein áseting um, at leigusáttmálin bert kann sigast upp, um so er at hin parturin ikki rættar møguligt brot 14 dagar eftir at hava fingið skrivliga áheitan um hetta.

Herumframt heldur felagið, at tað er natúrligt, at leigusáttmálin verður tinglýstur á ognina, og at tað verður gjørt eitt kort, ið greitt vísir, hvønn part á økinum á havnalagnum á Sundi felagið leigar.

Loksins krevur felagið, at tað verður ført inn í leigusáttmálan, at eigarin stendur inni fyri, at tað er loyvt at brúka økið til tað endamál, sum felagið hevur.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at gera nýggjan leigusáttmála við p.f. Asfaltverkið

- har ynski um at broyta grein 3 verður gingið á møti
- har ynski um at fáa grein 6, petti 3, víðkað við ásetan um, at felagið skal hava rætt til at leingja leigumálið í 10 ár afturat ikki verður gingið á møti, tí kommunan tá skal hava møguleika fyri at taka støðu til, um hon sjálv skal taka økið í nýtslu.
- ynskini um ískoyti í grein 7 verða gingin á møti, tó so, at leigarin bert skal kunna uppsiga sáttmala, um útleigarin brýtur hann.

**Fíggjarnevndin 19. august 2004:** Samtykt við teirri broyting, at sáttmálin staðfestur í § 3, at leigumálið einans umfatar framleiðslu og sølu av asfalti og at strika 2. petti í § 2.

**Býráðið 2. september 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**113/04** **200400016**

**Ársfíggjarætlanin 2005 hjá Tórshavnar kommunu.**

Uppskot til ásetan av karmum til gerð av uppskoti til fíggjarætlan.

**Fíggjarnevndin 19. august 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðtaka uppskot til karmar til gerð av ársfíggjarætlan, ið javnvigar við 453.024 tús. kr.

**Býráðið 2. september 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at taka undir við fíggjarnevndini og at beina uppskotið til viðgerð í fíggjarnevndini og nevndunum.

**114/04** **200302242**

**Skrá fyri verkætlan: Nýtt tyrvingarpláss**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Víst verður til mál 200300915 um tyrvingarplássið í Húsahaga. Tyrvingarplássið í Húsahaga verður fult um fá ár, og neyðugt er við drúgvum fyrireikingum, áðrenn annað øki kann takast í nýtslu sum tyrvingarpláss.

Umsitingin hevur í hesum sambandi, saman við ráðgevandi verkfrøðingunum Sp/F Martin E. Leo, gjørt eina forkanning, ið er ætlað at vera grundarlag undir eini verkætlan um nýtt tyrvingarpláss, j.nr. 200302242-3-SG.

Í forkanningini verða nevndir ymsir møguleikar fyri nýggjum tyrvingarplássi, t.d. grótbrotini á Glyvursnesi, í Hundsarabotni og á Sundi.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**
Útfrá kanningini verður mett, at skilabest er at arbeiða víðari við tveimum møguleikum, ávíkavist Glyvursnesi og Hundsarabotni. Eisini eigur at verða kannað um og í hvønn mun IRF er sinnað at samstarva við Tórshavnar kommunu um nýtt tyrvingarpláss.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at neyvari kanningar verða gjørdar av ávíkavist Glyvursnesi og Hundsarabotni sum tyrvingarpláss, herundir kostnaðarmetingar av neyðugum íløgum og rakstrarútreiðslum, at leggja fyri nevndina.
Tekniski stjórin mælir samstundis til, at avsettar verða kr. 500.000,- til projektering.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 9. desember 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum.
Eisini samtykt at umsitingin útgreinar tørvin á betri reinsiútbúnaði enn tað, ið nú verður brúkt, og kostnaðin av hesum.

**Ískoyti:**
Ráðgevandi verkfrøðingafelagið Sp/F Martin E. Leo hava saman við donsku ráðg. verkfr. fyritøkuni Rambøll A/S, gjørt nærri kanningar (Notat, dagfest 15. apríl 2004, j.nr. 200302242-8). Hesi pláss eru tikin við í kanningina:

- Grótbrotið á Glyvursnesi
- Grótbrotið í Hundsarabotni
- Útbygging í Húsahaganum.

Í hesum sambandi er gjørda arbeiðið grundað á hesi viðurskifti:

- Ávirkan á landslag og bústaðir.
- Ávirkan á áir og firðir.
- Nýtsla av økinum og náttúrutilfeingi.
- Atkomuviðurskifti og flutningsfrástøða.

T.v.s. at tað í fyrsta umfari ikki beinleiðis verður tikin støða til plásstørv, rakstrarútreiðslur, funktión, reinsiatgerð, fyribils kostnaðarmeting v.m.. Tó bendir alt á sambært forkanningini, at viðv. plásstørvi, er Glyvursnes eisini best egnaða staðið.

Niðurstøðan í kanningini er, at eitt tyrvingarpláss, sum bæði tekniskt og umhvørvisliga verður mett at vera ein tíðarhóskandi loysn, við fyrimuni kann staðsetast í grótbrotinum á Glyvursnesi.

Vísandi til forkanning og kanningar, sum eru gjørdar á teimum nevndu støðunum saman við Rambøll A/S, mælir ráðgevandi verkfrøðingafelagið Sp/F Martin E. Leo til, at nýggja tyrvingarøkið verður í grótbrotinum á Glyvursnesi.

**Tilmæli:**
Vísandi til umrøddu kanning og tilmæli frá ráðgevunum, mælir tekniski stjórin til, at grótbrotið á Glyvursnesi verður valt til nýtt tyrvingarpláss. Víðari verður mælt til at gera projektuppskot við tekniskari/búskaparligari greining av:

- Ruskmongdum/livitíð.
- Innrætting av økinum.
- Val av geologiskari verju.
- Uppsamling og reinsing av frárenning frá økinum.
- Gerð av kostnaðarmeting og tíðarætlan.

Eisini verður mælt til:

- At søkt verður um prinsipiella umhvørvisgóðkenning av økinum, tá ið neyðugt umsóknartilfar fyriliggur.
- At kannað verður um friðingarmyndugleikarnir skulu geva loyvi sambært náttúrufriðingarlógini og um so er, at søkt verður um loyvi.
- At heitt verður á fíggjarnevndina um at útvega lendi.
- At heitt verður á byggi- og býarskipanarnevndina um at gera neyðugu broytingarnar í byggisamtyktini og at avseta økið til tyrvingarpláss.
- At heitt verður á teknisku nevnd um at dagføra vegasambandi soleiðis, at tað verður hóskandi til regluliga tunga ferðslu.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 19. mai 2004:** Nevndin samtykti at umsitingin kannar møguleikan fyri at finna annað øki til tyrvingarpláss enn Glyvursnes.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við Ráðgevandi verkfrøðingafelagnum Sp/F Martin E. Leo og Rambøll kanna aðrar møguleikar fyri tyrvingarplássi. Í hesum umfari eru hesi støð kannað:

- Grótbrotið á Sundi.
- Økið sunnan fyri Glyvursnes, í Glyvurshaganum.
- Økið við gomlu sildaverkssmiðjuna, sunnan fyri Velbastað.
- Grótbrotið á Glyvursnesi – enn einaferð.

- Fossdalur norðan fyri Velbastað.

Niðurstøðan er, at av teimum higartil kannaðu økjunum er Grótbrotið á Glyvursnesi bæði umhvørvisliga, tekniskt og tá hugsað verður um nýtslutíðina best egnaða øki. Víst verður annars til niðurstøðuna og raðfestingina í hjálagda notati.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin heldur fast um tilmæli til seinasta fundin hin 19. mai 2004.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 23. juni 2004**: Ein meiriluti, Høgni Mikkelsen, Schumann Hjaltalin og Tórfinn Smith, samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum.

Ein minniluti, Beate L. Samuelsen, tók ikki undir við tilmælinum.

Ein annar minniluti, Hildur Eyðunsdóttir, krevur málið fyri býráðið.

**Býráðið 2. september 2004:** Atkvøtt var um minnilutatilmælið frá Beate L. Samuelsen um at beina málið í heilsu- og umhvørvisnevndina sum var samtykt við 9-1 atkvøðum.

Fyri atkvøddu Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Schumann Hjaltalin, Høgni Mikkelsen, Jákup S. Joensen, Heðin Mortensen, Jan Christiansen, Elin Lindenskov og Hildur Eyðunsdóttir. Ímóti atkvøddi Leivur Hansen.

**115/04** **200300616**

**Áheitan frá Trygva F. Guttesen, dagfest 19. juli 2004, um at verða loystur frá sínum limaskapi í býarskipanarnevndini.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Á býráðsfundi 22. mai 2003 var Trygvi Guttesen valdur sum fastur limur, og 25. juni 2003 var Debess Danberg valdur sum varalimur hansara.

**Býráðið 2. september 2004:** Valdur var Debess Danberg sum fastur limur og Jógvan Thomsen sum varalimur hansara.

**116/04** **200400271**

**Fráboðan frá Jóannesi Dalsgarð, dagfest 6. apríl 2004, at hann ikki kann taka við valinum sum valstýrislimur til næsta býráðsval.**

**Býráðið 2. september 2004:** Vald var Guðrið Rubeksen.

**117/04** **200100200**

**Val av felags valnevnd til býráðsvalið í november 2004.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært § 25b í broytingaruppskoti til vallógina skal nýggj felags valnevnd, við minst 3 limum, verða vald av samanleggjandi kommununum at skipa fyri valinum.

**Býráðið 2. september 2004:** Valdir vóru Steen Juul Pedersen, Niels Nattestad og Eli Christiansen.

**FUNDUR LOKIN KL. 19.30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Jákup Suni Joensen | Høgni Mikkelsen |
| | Schumann Hjaltalin | Sjúrður Olsen |
| Beate L. Samuelsen | | Elin Lindenskov |

| | | |
|---|---|---|
| Hildur Eyðunsdóttir | | Leivur Hansen |
| Annfinn Brekkstein | | |
| | Jan Christiansen | |